gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Eyðsýndari mentanarpolitikkur – eyðsýndur landsstýrismaður

## *Oddagrein*

MENTANARPOLITIKKURIN verður nú meira eyðsýndur í føroyskum politikki. Tað var boðskapurin hjá tí nýggja landsstýrismanninum í mentanarmálum, Torbirni Jacobsen. Hesi stevnu taka flest allir framkomnir føroyingar undir við, tí mentanin hjá eini tjóð er kjølfestið hjá fólkinum og skapar samleikan hjá tjóðini. Mentanin er harafturat ítrivið hjá mongum, og skapar tað, sum mong onnur – føroyingar og útlendingar – kunnu njóta og fegnast um.

HIGARTIL hava mentanarmál ikki verið raðfest so frammarlaga, tá uppskotið til fíggjarlóg verður gjørt. Tað verður kanska øðrvísi nú, tá vit hava tveir landsstýrismenn úr sama flokki. Harafturat tykist eisini, at teir draga somu línu í tí annars tvíbýtta flokkinum eftir hendingarnar við undanfarna landsstýrismanninum, Signari á Brúnni.

TAÐ skerst ikki burtur, at Føroyar fáa ein sermerktan landsstýrismann. Í politiskum høpi hevur Torbjørn Jacobsen gjørt mest vart við seg við mergjandi røðum. Tær hava bæði verið speirekandi, harðligar og hava samstundis víst ein breiðan sjónarring, sum er góður at fáa í okkara heimliga mentanarliga dunnuhyl. Hann hevur rópt hart og tað fær hann óivað eisini brúk fyri, um hann skal vinna frama fyri ætlan síni um at gera mentanarpolitikkin sjónligari.

AFTURÍMÓTI skal helst størri diplomatiskt snildi til, tá umrøður føroyskan skúla- og útbúgvingarpolitikk. Á hesum øki hevur verið ófriðarligt seinasta árið, og líkt er ikki til, at øll viðurskifti eru komin upp á pláss innan fólkaskúlan og karmarnar fyri miðnámsútbúgvingina í høvuðsstaðnum eru ikki greiðar. Her eru tí stór tøk at taka – ikki minst í arbeiðnum at laga skúlaverkið til eitt føroyskt fullveldi.

AT Tjóðveldisflokkurin fór at velja nýggjan landsstýrismann nú, kom óvart á mong, tí frágreiðingin um embætisførsluna hjá Signari á Brúnni verður liðug um stutta tíð. Nú kann so spyrjast, um tað ongantíð var ætlanin at bíða eftir úrslitinum frá kanningini. Signar fór jú frá »fyribils«, meðan ein kanning varð gjørd. Hetta lovaði flokkurin honum. Merkir tað ikki, at flokkurin lovaði honum nakað, sum ein partur í flokkinum kortini ikki ætlaði at halda. Hvat siga viðhaldsmenninir hjá Signari í flokkinum til hesa avgerðina. Vóru teir og Signar sjálvur ikki í so bláoygdir, tá teir góðtóku at Signar fór frá »fyribils« og lovaðu honum eina kanning. Hevði ikki verið rættari at sagt sum var, at flokkurin var ikki nøgdur við landsstýrismannin, og tí setti annan mann í staðin?

AT enda, tillukku Torbjørn, og góðan byr við vón um ein virknan mentanarpolitikk.

***Sosialurin***

## Viðmerkingar

# Viðmerking til oddagrein í Sosialinum 21. juli 2000



Hvat sipað verður til, tá skrivað verður, at verkafeløgini ikki standa saman, veit undirritaða ikki. Vit hava í dag eina vælvirkandi fakfelagsrørslu, sum sjáldan fyrr hevur staðið so væl saman. At vit ikki enn hava eitt sokallað LO í Føroyum er rætt, men 7-mannabólkurin, sum byrjaði at virka í 1998, arbeiðir fram móti einum tættari og betri skipaði fakfelagsrørslu í Føroyum. Tá umrøður mál, sum til dømis tað sum kemur fram í ljósmála í hesum døgum, har arbeiðsgevarir ikki virða starvsfólkið til at tey fáa eina mannsømuliga løn, og fleiri heldur ikki fáa mannsømulig kor at arbeiða undir, skal eingin ivast í, at her standa verkamannafeløgini saman, og veita sín fulla stuðul til avvarandi verkafeløg.

Hoyvík, 21. juli 2000

**Joan Ziskason, forkvinna**

# Café Natúr – ein skomm

Ja, hvør minnist ikki, tá ið hendan annars so praktfulla caféin læt upp. **Praktfull?** Ja, so sanniliga var hon praktfull. Og hetta ikki bara, tí hon var tann fyrsta »ordiliga«, men kanska eina mest, tí hon stendur á allarbesta caféumhvørvi, ein yvirhøvur kann finna her í Føroyum. (Her nýtist eingin diskutión, og staðið nýtist ikki eina nærri lýsing – tað kenna vit øll).

Men meðan idyllurin valdar uttan fyri og á sjálvari húsa »fasaduni«, ger hann tað neyvan longur innan fyri (í øllum føri ikki um tú ert ein tilvitaður kundi, t.v.s. *kundar við respekt fyri sær* ***sjálvum*** *í tí* ***starvsfólki,*** *sum veitur ta tænastu, sum skal til á slíkum stað).*

Eg undirritaði havi sjálvur javnan vitjað »natúrina« ella »niðurtúrina«, síðan hon av fyrstan tíð læt upp, og var sera fegin um hetta staðið øll tey fyrstu árini, men kann ikki annað siga, enn at eg, sum frá hevur liðið og serliga seinastu 2-3 árini, eri vorðin alt meira og meira ónøgdur.

Tænastan er støðugt lækkandi (er nú umsíðir komin niður á eitt støði, ið tú bert kann finna í teim ringastu vertshúsunum uttanlands – hetta er ikki skemt, men meint í ramasta álvara) – og av hesum sama er stemningurin *frá* starvsfólki til kundan, tann hann er – **ófrískur, kantutur** og til tíðir ikki sørt **gruggutur** (ja, hvør skuldi sagt – minnir kanska ikki heilt einki um tað *nýmalna kaffi* ein kann keypa sær har niðri).

Men misskilji meg ikki, tit góðu, nýfarnu starvsfólk, ið gjørdu tað, eitt menniskja við virðing fyri sær sjálvum, í slíkum føri eigur at gera, nevniliga lótu tykkum siga upp.

Flestu tykkara vóru fult út kompetent, lat ikki iva vera um tað. Heldur mundu tað vera vanvirðisligu arbeiðstreytirnar, ið køvdu tykkara gestahjørtu og innaru smíl. Tí sjálvsagt fer ikki ein kompetentur persónur at selja sín tænastuevnir fyri tað, ið liggur beint oman fyri **eina øl um tíman.** Ein slíkur persónur er **ikki kompetentur,** men **idiot.**

At tað so tók tykkum langa tíð at gera upp við tykkara egna idioti, ja lat tað so vera. Tað mest umráðandi við hesum er, at tit funnu eitt hægri støði at festa tykkara mensku á. Hetta, sum flestu kunnugt, við at krevja eina løn, ið liggur eitt *sindur* omanfyri depriveraðu prostitutiónina.

Tá eg sigi eitt sindur, kemst hetta av, at eg meti eitt lønarkrav uppá 120 kr. um tíman (og er hetta við ella uttan frítíðarløn?) – á ólavsøku við tí hurlivasa og drykkjulevnaði, ið vil verða á slíkum stað, vera so absolutt tað *allarminsta* ein eigur at selja seg fyri.

Eg veit (og hetta kann prógvast), at tað finnast arbeiðsgevarar, ið hava ringt við at skaffa fólk at arbeiða á ólavsøku fyri tímaløn, ið liggur heilt uppi á 200 kr. um tíman. So, Turið Samró, hvat billar tú tær inn!

Her til seinast ein lítil heilsan til teir nýkomnu verkfalsbrótararnar: Finnið virðing fyri tykkum sjálvum, eins og tey undanfarnu, og sigið upp. Um ikki, so góðtakið tit til eina og hvørja tíð at verða kallað »idiotar«.

ES: Sum tilvitaður kundi og persónur við virðing fyri mær sjálvum, fari eg, so leingi so mannminkandi kor valda á »caféini«, at siga manga takk fyri meg við vón um, at onnur, ið kenna tað eins, velja hetta sama.

Latið so bara hasar »**Turist**arnar« har niðri hava tað so gott.

Við verkfalssamkenslu og ynski um eina góða ólavsøku.

**Bárður Persson**

# Skráin fyri jassfestivalin klár

*Skráin fyri jass-, fólka- og bluesfestivalin í august er klár, og frá í dag ber til at keypa atgongumerki*

Jassfestivalurin í ár byrjar mikudagin 9. august og heldur fram vikuna út. Við á jassfestivalinum í ár eru nøvn úr Føroyum, Danmark, Íslandi, Grønlandi, Finnlandi og Noreg.

Atgongumerkjasølan er byrjað, og fást atgongumerkini til keyps í Norðurlandahúsinum og í Kunningarstovuni.



*Norðurlandahúsið verður karmur um jassfestivalin*